LM-099/2023

Annika Petersen

Fylgiskjal 33

Fra: Amanda Maria Gullaksen <amanda.maria.gullaksen@gmail.com>
Sendt: 22. februar 2024 09:19
Til: VMR-Journal
Emne: Til hoyringar viðv ferðavinnu

Til hoyringina um ferðavinnulóg

Tað er frustrerandi at vera gongufólk í hesum tíðum. So troyttandi at ferðafólk koma her og forstýra okkum idyllin. Hetta, at øll skullu hava frítt at ganga, er eitt stort problem

Sum fjallafólk havi eg og fleiri við mær síðstu 20 árini gingið í fjøllunum runt allar Føroyar. Tey fyrstu árini, sum um vit átti hagan sjálvi. Sum bygda- og óðalsfólk visti eg eitt sindur um seyðahald og hevði virðing fyri tí. Ongantíð vóru trupuleikar við, at bóndur ella røktingarfólk róku okkum vekk. Al oftast vóru vit møtt við blíðskapi. Men tað kom sjálvandi fyri at onkur viðmerkti, tá vit fóru um teirra mark, og vit brutu mørk í óvidenheit og spontaniteti. Hesi árini hava givið eitt sindur av innlit í, hvat gongur fyri seg í høgunum í Føroyum og givið stóra virðing fyri tí verðini.

Nú eru fjallafólkini blivin so nógv, og so koma ferðafólkini afturat. Hundratals fólk fara út í hagan. Tí skilur man væl at bóndur og røktingarfólk vilja verja seg ímóti at blíva invaderaði av fólkið, sum skullu ganga frítt. Tað er ikki bara gongufólk, sum skullu hava rættindi. Tann sum varðir av haganum skal hava ein rætt at siga frá, ikki bara at melda, í periodum, tá økið og fenaður er sárbært og krevur frið.

Nógv siga, at tey vilja ikki biða nakran bónda um loyvið. Men nógv vita slett ikki, nær og hvar man forstýrar somikið, at tað ger fortreð. Tí er nógvar periodir gott at boða frá, áðrenn man fer. Eitt ynski herfrá er, at tað bleiv lættari, at fáa fatur á rætta viðkomandi, sum varðir av haganum. Tað hevði verið gott.

Vónandi sleppa vit ein túr í hagan, við einum smidligum sambandi við røktingarmenn.

Her eru kanska naivir tankar

Í staðin fyri: "Einum og hvørjum frítt" í parag3. Kundi staði: Ferðavinnu í samstarv við jarðarfólk

Ístaðin fyri: "jarðareigarar og jarðbrúkarar" í parag14: Føroya Óðalsfelag & Bóndafelag ella Umhvørvisstovan.M.a til at gera smidliga/dagliga samskiftisskipan fyri búðsitandi og ferðavinnu. Og jarðarfólk og Uvmr forplikta seg til at boða frá, nær og hvar økir av hagi skullu hava frið - pragmatiskt. So hava teir ábyrgd av at steðga gongd í haga, tá tað er rímuligt. Áðrenn lembing er rímuligt við friði í økjum, har fylgið heldur til. At seyður liggur á bóli er órímuligt. Mín vón er sjálvandi, at tað ikki ikki so ofta er rímuligt, kanska at teir gloyma at lýsa friðing

Vinnuligt virksemi og byggivirksemi uttangarðs burdi kanska verið góðkent av Umhvørvisstovuni(uvmr), um tað ikki longu er eitt krav

Er neyðugt at bygd og kommunur eru uppií? Uttan at fáa ein part av ferðavinnuavgjaldinum til lokala ferðavinnu.

Virðingarmest

Amanda Gullaksen